# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Somaliumenninir siga, at vit fara at sleppa heimaftur, og eg velji at trúgva teimum*

*(skiparin á Danica White í telduposti)*

# Madeleine er helst seld

**Franska løgreglan ber ótta fyri, at Madeleine McCann gjørdist offur fyri mannahandli**




*Um vikuskiftið komu børn í Madrid saman at minnast Madeleine Mc Cann og spanska smádrongin Yeremi Vargas, sum hvarv á Kanarisku Oyggjunum fyri trimum mánaðum síðani*

Hevur franska løgreglan rætt, bleiv tann fýra ára gamla gentan rænd við sølu fyri eyga. Serfrøðingar hjá løgregluni siga, at eystur-evropeisk brotsmannalið ræna børn og selja tey í stórhandlum og á parkeringsplássum í Portugal og Fraklandi. Tey verða seld á uppboði, og franska løgreglan sigur, at fyri eitt barn sum Madeleine McCann kunnu burturflytararnir hava fingið einar 75.000 krónur.

Í samrøðu við Sky News sigur ein ónevnd kelda í fronsku løgregluni, at handil við smábørnum er meiri vanligur, enn tey flestu geva sær far um. Sum dømi nevnir keldan, at fyri stuttum royndi ein mamma at selja sítt egna barn norðan fyri Lisboa í Portugal, og í franska býnum Bordeaux tók løgreglan eini rumensk hjún, sum royndu at selja eina gentu á einum parkeringsplássi.

Tað eru tó ikki allir serfrøðingar, sum halda, at Madeleine McCann bleiv rænd, tí hon skuldi seljast. Summir serfrøðingar, sum Sky News hevur tosað við, vísa á, at tvey yngri systkin svóvu eisini í hotellkamarinum, og at mannahandilsmenn vanliga ræna tey yngstu børnini.

# Nú er tað Brown

**Í gjár tók Gordon Brown við sum formaður í bretska arbeiðaraflokkinum**

- Tann nýggi formaðurin í Labour eitur Gordon Brown. Tað er tað besta fyri landið, tí hansara besta fær ikki verið betur, segði Tony Blair, tá hann á floksfundi í gjár alment kunngjørdi formansskiftið.

Við hesum hevur Gordon Brown tikið tað fyrra stigið, tí um nakrar dagar verður hann eisini forsætisráðharri - eitt starv, sum hann hevur bíðað eftir í meiri enn tíggju ár. Tær seinastu meiningakanningarnar vísa eisini, at hann hevur góðan byr í løtuni. Labour fær í kanningunum 39 prosent av atkvøðunum og tey konservativu 36, og hetta er fyrstu ferð í átta mánaðir, at Labour liggur oman fyri tann stóra andstøðuflokkin. Blaðið The Observer hevur spurt bretar, hvat tey vænta sær av Gordon Brown sum forsætisráðharra. 40 prosent vænta, at hann fer at roynast sum ein dugnaligur stjórnarleiðari, og 22 prosent siga, at tey vildu heldur havt tann konservativa leiðaran, David Cameron, í Downing Street.



*Søguligt leiðaraskifti í Bretlandi, nú Gordon Brown tekur við eftir Tony Blair*

## STUTT SAGT

### Latnir leysir

Fýra menn, sum hava verið gíslar hjá burturflytarum í Nigeria, sluppu leysir í gjár. Teir fýra menninir, sum eru úr Bretlandi, Fraklandi, Niðurlondum og Pakistan, vórðu burturfluttir tann 1. juni í havnarbýnum Port Harcourt. Ein talsmaður hjá fyritøkuni Schlumberger, sum menninir arbeiða hjá, sigur, at teir hava tað gott eftir umstøðunum. Burturflytingar eru rættiliga vanligar í Nigeria., og teir seinastu átjan mánaðarnar eru umleið 200 útlendingar burturfluttir. Tey flestu hava arbeitt í oljuvinnuni.

### Átak ímóti mafiuni

Løgreglan í Italia tók leygardagin níggju menn, sum hava havt leiðandi leiklut í virkseminum hjá mafiuni á oynni Sisilia, og sum sambært løgregluni høvdu lagt ætlanir um at beina fyri nøkrum tjóvum, sum hava órógvað virksemið hjá mafiuni í seinastuni. Millum teir tiknu er Tommaso Camella, sum hevur staðið á odda fyri mafiuni í býnum Prizzi. Løgreglan sigur, at hon fekk frænir av morðætlanunum við lurta eftir telefonini hjá nøkrum mafialimum.

### Waldheim jarðaður

Fyrrverandi ST-aðalskrivarin Kurt Waldheim, sum doyði tann 14. juni, varð jarðaður í Wien um vikuskiftið. Waldheim var eysturríkskur forseti frá 1986 til 1992, og núverandi forsetin, Heinz Fischer, var millum teirra, sum høvdu orðið undir jarðarferðini. Hann nevndi millum annað, at Waldheim bleiv lagdur undir ymiskt, sum hann ikki hevði gjørt. Við hesum sipaði hann til, at Walsheim gjørdi tænastu í týska herinum undir seinna heimsbardaga.